# Vitjan av Fiat ellisakførum úr Danmark

**Mánadagin 29. mai fáa vit vitjan úr Danmark av sjey smáum Fiat bilum, har tann elsti er frá 1950. Talan er um limir í Fiat Mini Klub, Sjælland, sum í einum ferðalagið upp á 14 fólk skulu ferðast kring landið við bilunum**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Mánadagin 29. mai fáa vit vitjan úr Danmark av sjey smáum Fiat bilum, har tann elsti er frá 1950*

Ferðin byrjar í Hanstholm leygardagin 27. mai, tá bilarnir koyrdir umborð á Norrönu. Nøkur í ferðalagnum sigla við Norrönu, meðan onnur koma við flogfari.

Mánadagin 29. mai koma so allir sjey Fiat bilarnir í land í Havn.

Ferðin er komin í lag í sambandi við at Jørgen Mikkelsen, sum starvast hjá inventarfyritøkuni TOBI A/S, hevur verið nógv í Føroyum í arbeiðsørindum. Tað eru Jørgen Mikkelsen og konan Lisa, sum hava lagt túrin í Føroyum til rættis.

Bilarnir sum tey 14 fólkini í ferðalagnum hava við sær eru: Tríggir Fiat 500, sum eru frá ávikavist 1950, 1962 og 1968, og tríggir Fiat 600, sum eru frá 1962, 1972 og 1973. Tann nýggjasti er ein Fiat 126 frá 1974.

Sama dag sum tey koma, mánadagin 29. mai kl. 16.00, verða bilarnir sýndir fram uttan fyri hjá BR Leikum á Hálsi, har verður høvi hjá fólki at síggja bilarnar og fáa eitt prát við eigararnar.

BR Leikur hava nøkur sera góð tilboð hendan dagin við modellbilum í sambandi við Fiat-vitjanina.

Ferðalagið fer at ferðast kring landið við bilunum. Tey skulu vitja í Suðuroy, Sandoy, Eysturoy, Norðoyggjum og í Vágum. Tey hava lagt eina nágreiniliga skrá fyri túrin.

Bilarnir fara avstað við Norrönu fríggjadagin 9. juni.

# Lat bilstólin hjá barninum venda aftureftir

**Ráðið fyri Ferðslutrygd heitir á foreldur at tryggja børn síni á besta hátt, tá ferðast verður í bili. Smábarn, ið situr í bilbarnastóli, ið vendir aftureftir, er fimm ferðir tryggari í ferðsluni, vísa kanningar**

FERÐSLUTRYGD

Fyri at bjarga enn fleiri børnum í ferðsluvanlukkum hava "tung" umboð innan svenska bilídnaðin tikið seg saman um eina felags virkisætlan.

Virkisætlanin er komin í lag orsakað av, at talið á børnum í Svøríki, ið koyra í bilstólum, sum venda aftureftir er minkandi. Tað fer helst at hava við sær, at talið á álvarsliga skaddum og deyðum børnum fer at vaksa, stendur at lesa á heimasíðuni hjá svenska ferðslutrygdarráðum.

Kanningarnar vísa nevniliga, at aftureftir vendir bilbarnastólar eru fimm ferðir tryggari, enn bilstólar, ið venda frameftir.

Endamálið við virkisætlanini er fyrst og fremst at hava eyga við bilbarnastólmentanini í Svøríki.

Við í virkiskætlanini, saman við myndugleikunum, eru eitt nú bilfyritøkurnar Renault, Peugeot, Volvo, GM Saab, GM Opel, VW, Hyundai, Kia og Toyota.

Verkætlanin er tann fyrsta av sínum slagi.

Svøríki hevur í nógv ár gingið undan við atliti til tryggleika hjá børnum í bili. Umframt eina røð av starvsstovuroyndum, hava sviar eisini gjørt gjøllar kanningar av einum stórum tali av ferðsluvanlukkum við børnum.



*Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir til, at børn upp til 2-3 ára aldur verða bundin í stólar, ið venda aftureftir. Men, tú mást ansa væl eftir at seta stólin rætt, tí skeiv uppseting gongur út yvir trygdina*

## Landsvirkisætlan

Ein slík virkisætlan er úrslit av, at Svøríki hevur eina landsvirkisætlan fyri ferðslutrygd. Norðurlond hava øll – uttan Føroyar – eina landsvirkisætlan fyri ferðslutrygd.

Føroyar hava júst fingið staðfest Nullhugsjónina við lóg, og tað er eitt stórt stig framá.

Næsta stigið verður ein landsvirkisætlan fyri ferðslutrygd í Føroyum, sum skal gera tað møguligt at náa endamálinum við Nullhugsjónini.

*Keldur: ntf.se, folksam.se, sikkertrafik.dk og ferdslutrygd.fo*


· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo